SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit hoyra bara spreingingar og skot. Vit sleppa ikki út at keypa, og børnini eru í einum rúmi*

*(kvinna í Gaza)*

# Líkist mest borgarakríggi

**Bardagarnir í Gaza millum palestinsku felagsskapirnar Hamas og Fatah hava kostað næstan 40 mannalív. Í fleiri førum er talan um beinleiðis avrættingar**



*Hamas-limir við maskinbyrsu og gekkaskorti í gøtunum í Gaza í gjár*

Í gjár varð Fatah-leiðarin Jamal al-Jedyan jarðaður í einari flóttafólkalegu har norðuri í Gaza-geiranum, eftir at skyldfólk hansara høvdu funnið líkið av honum uttan fyri húsini, har hann búði. Eygnavitni vistu at siga frá, at nakrir vápnaðir menn úr Hamas vóru komnir til húsini, høvdu togað Fatah-leiðaran út í tún og skotið hann. Sambært læknunum var hann skotin 35 ferðir.

Jamal al-Jedyan var ein av teimum 17, sum lótu lív í gjár í bardøgunum millum Hamas og Fatah í Gaza-geiranum. Fyrradagin doyðu 19 onnur, og eingin verðyr eirdur. Í gjár royndi Fatah at beina fyri Ismail Haniyeh, forsætisráðharra, sum er úr Hamas, og løtu seinni skutu Hamas-limir eftir einum húsum hjá Mahmoud Abbas, forseta, sum er úr Fatah. Hvørgin teirra var við hús.

Bæði Abbas og Haniyeh hava biðið sínar vápnaðu viðhaldsmenn leggja vápnini beinanvegin, men higartil til fánýtis. Tvørturímóti er líkt til, at Hamas hevur sett sær fyri at styrkja sína støðu í Gaza, tí felagsskapurin hevur tikið minst tvær støðir hjá Fatah og miðvíst beint fyri Fatah-leiðarum.

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch segði í gjár, at hvørki Fatah ella Hamas virða altjóða mannarættindini, og at fleiri krígsbrotsverk eru framd í Gaza teir seinastu dagarnar.

- Teir vápnaðu bólkarnir hava brotið altjóða mannarættindalógir fleiri ferðir, segði Sarah Leah Whitson, talskvinna hjá HRW, við Reuters.

# Nýtt og gott gamalt í Ísrael

**Ísraelski arbeiðaraflokkurin hevur fingið nýggjan formann, men tað er ein gamal leiðari, sum kemur afturíaftur**



*Ehud Barak varð stórliga fagnaður aftan á formansvalið í gjárkvøldið*

Við 51,3 prosentum av atkvøðunum hava limirnir í ísraelska arbeiðaraflokkinum gjørt av at velja Ehud Barak til floksformann. Hitt valevnið, fyrrverandi fregnartænastuovastin Ami Ayalon, fekk 47,4 prosent.

Ehud Barak loysir Amir Peretz av í formansstólinum í arbeiðaraflokkinum. Peretz, sum er verjumálaráðharri í stjórnini hjá Ehud Olmert, varð valdur til floksformann í november í 2005 og skuldi leiða flokkin til valdið á valinum í mars í fjør. Men blóðproppurin hjá Ariel Sharon gjørdi, at valstríðið bleiv ikki sum ætlað. Í seinastuni hevur Peretz verið fyri hvøssum atfinningum, tí hann sum verjumálaráðharri má átaka sær ein stóran part av, at ísraelski herurin fekk stórar trupulleikar í Suðurlibanon seinasta summar.

Ehud Barak er ein gamal kenningur í ísraelskum politikki. Hann var forsætisráðharri frá mai í 1999 til mars í 2001, og tað var hann, sum í 2000 gjørdi av at taka ísraelska herin úr Suðurlibanon eftir átta ára herseting.

Ehud Barak, sum er gamal generalur, var millum teirra, sum vildu hava Ehud Olmert, forsætisráðharra at leggja frá sær orsakað av tí miseydnaða krígnum við Hizbollah í fjør. Politiskir eygleiðarar í Tel Aviv vænta nú, at Olmert fer at biðja Barak um samstarv beinanvegin, og at hann fer at bjóða honum okkurt týðandi ráðharrastarv.

## STUTT SAGT

### Eingin skipað andstøða

Aftan á tann borgarliga sigurin á fyrra umfari av franska tjóðartingsvalinum seinasta vikuskiftið ætlaði sosialistaleiðarin, Segolene Royal, at andstøðan skuldi taka seg saman fyri at standa sterkari á seinna valumfari, sum verður tann 24. juni. Men í gjár kunngjørdi leiðarin í miðflokkinum, Francois Bayrou, at hann tekur ikki undir við hugskotinum hjá Royal. Francois Bayrou stillaði upp á forsetavalinum herfyri, men tapti í fyrra umfari, og hann hevur eftir øllum at døma ongan hug at royna seg ímóti tí borgarliga vonginum hjá Nicolas Sarkozy, forseta eina ferð afturat longu nú.

### Misbrúkti sjúkrabil

Gustavo Selva er farin frá sum senatorur í Italia, eftir at tað bleiv avdúkað, at hann hevði misbrúkt sína støðu sum limur í senatinum í Rom. Fyri nøkrum døgum síðani kom fram, at Gustavo Selva hevði biðið ein sjúkrabil koyra seg til eina sjónvarpsstøð, tí sjónvarpið skuldi hava samrøðu við hann. Tað vóru sera nógvir bilar í gøtunum hendan dagin, men við einum ýlandi sjúkrabili kom senatorurin fram til ásettu tíðina. Men slíkt gongur ikki, og í gjár kunngjørdi tann 80 ára gamli senatorurin, at hann hevði sagt tingsessin frá sær.

### 35 ára fongsul

ST-krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur dømt fyrrverandi serbiska uppreistrarleiðaran í Kroatia, Milan Martic, 35 ára fongsul fyri ymisk brotsverk undir borgarakrígnum á Balkan fyrst í nítiárunum. Tann 52 ára gamli Milan Martic varð millum annað dømdur fyri morð og pining og fyri at hava rikið kroatar og muslimar frá húsi og heimi.